# Neistin stríddist til tað síðsta




*Neistakvinnur fingu eina stigi norð við aftur úr Vági*

**HONDBÓLTUR** Birita Wardum hevði neyðuga dirvið, tá hon sendi seinasta skotið avstað og syrgdi fyri, at Neistin fekk stig við sær heim. Oddaliðini vunnu greitt

Uni Holm Johannesen

26-26 var úrslitið, tá VB og Neistin spældu í Vági.

Bæði liðini hava runnið aftaná Stjørnuni og Tjaldrinum seinastu kappingarárini. Tað eru greiðar ábendingar um, at tað fara kvinnurnar úr Vági og Neistanum eisini at gera í hesum kappingarárinum.

Tað var í seinastu løtu, at gestirnir úr høvuðsstaðnum vunnu seg upp á javnt.

VB var á odda við, tá ein minuttir restaði í.

Neistin gav bóltin upp og hevði sína seinastu roynd at fáa stig burtur úr dystinum. Tá var tað, at Birita Wardum gjørdi bart.

### Útlendingarnir eyðsýndir

Tað hilnast oftast væl, tá útlendskir leikarar spæla í Føroyum. Tað eru óteljandi dømi um, at tær hækka støðið munandi, og tær eru somuleiðis meira eyðsýndar enn føroysku spælararnir.

Tað var aftur soleiðis í gjár.

Gintare Lydekaite, VB, var toppskjútti hjá heimaliðnum við 10 málum. Hon var serliga trygg við brotskøstum, og hon sendi fimm av teimum framvið Neista-málverjanum.

Barbara Brauer, Neistin, skeyt flest mál. 11 ferðir fór hon buldrandi ígjøgnum og sendi kúluna avstað.

### Oddaliðini vunnu

Stjørnan og Tjaldrið hava framvegis fult stigatal, hóast klaksvíkskvinnur hava spælt tveir dystir fleiri.

Stjørnan vann greitt á útivølli móti StÍF. Gestirnir vunnu sær skjótt eina greiða leiðslu, og heimaliðið kom ongantíð aftur.

Durita Ljósstein, átta mál, og Durita Christophersen, seks mál, skaraðu burturúr og skutu flest mál fyri verandi føroyameistararnar.

Leikgongdin var ikki petti øðrvísi, tá Tjaldur hevði vitjan av VÍF.

Heimaliðið setti ferðina upp beinanvegin og rann avstað frá fyrsta bríksli. Tað var miðskeiðis í fyrra hálvleiki, at tað skrædnaði av álvara. Tá fór heimaliðið, við Simonu Petersen á odda, frá 10-6 til 16-6.

Liljan Djurhuus, VÍF, hevur, eins og í fjør, verið eyðsýnd í hesum kappingarárinum. Í gjár var hon ein støðug hóttan, og við sínum 11 málum staðfesti hon sína støðu, sum ein av fremstu hondbóltsspælarunum í landinum.

# Bara útisigrar

**FLOGBÓLTUR** Útiliðini vunnu, tá fýra landskappingardystir hjá kvinnunum vóru avgreiddir í vikuskiftinum

Uni Holm Johannesen

Fleyr vann 3-0 á ÍF.

Fyrstu tvey settini vóru sera tøtt – bara trý og fýra stig skiltu liðini. Mótbrekkan tóktist vera ov stór hjá fuglfirðingunum, sum gjørdi lítið um seg í triða settinum. Tá vann Fleyr við 25-12.

ÍF er aftast aftná tveir dystir. Fleyr spældi fyrsta dystin hesaferð.

Ternan, sum er uppflytari, tapti 1-3 á heimavølli móti Mjølnir.

TB vann 3-2 móti Drátti og SÍ vann 3-1 í Kollafirði móti KÍF.

*uni@sosialurin.fo*



# Lítið og einki skilti liðini

**FLOGBÓLTUR** Fleyr kundi ikki vinna meira tepurt, tá høvuðsstaðarfelagið vitjaði í lítlu høllini í Sørvági í vikuskiftinum

Uni Holm Johannesen

Flogbólturin er nú av álvara aftur í luftini.

Høllin í Sørvági var karmur um fyrsta oddadystin í hesum kappingarárinum, tá SÍ hevði vitjan av Fleyr í vikuskiftinum.

Gestirnir vunnu 3-2. Gestirnir vunnu seinasta settið 17-15.

SÍ var aftan fyri við 2-0, áðrenn liðið bardi seg upp á javnleik, men Fleyr átti seinasta orðið.

Jón Nielsen, SÍ, var aftur serliga eyðsýndur. Hann gekk fremst, tá SÍ vann 3-0 á Tvøroyri í fyrsta landskappingardystinum. Hóast hann stóð seg væl í verjupartinum og álopspartinum, so var tað ikki nóg mikið.

TB, sum er uppflytari, hevur ikki lagt væl frá landi. Tvøramenn hava tapt fyrstu tríggjar dystirnar 3-0. TB spældi móti ÍF og Mjølnir í vikuskiftinum.

*uni@sosialurin.fo*

EIK-LIGAN, MENN:

**TB - Mjølnir** 0-3
(18-25, 21-25 og 18-25)

**SÍ - Fleyr** 2-3
(23-25, 19-25, 25-21, 25-18 og 15-17)

**ÍF - TB** 3-0
(25-23, 25-19 og 26-24)

EIK-LIGAN, KVINNUR:

**Dráttur - TB** 2-3
(25-22, 12-25, 24-26, 25-20 og 14-16)

**KÍF - SÍ** 1-3
(25-20, 20-25, 15-25 og 22-25)

**ÍF - Fleyr** 0-3
(22-25, 21-25 og 12-25)

**Ternan - Mjølnir** 1-3
(14-25, 25-20, 18-25 og 11-25)

SUNSET DEILDIN, KVINNUR:

**StÍF - Stjørnan** 19-27 (9-15)

**10 min.: 1-4**
**20 min.: 4-8**
**40 min.: 12-19**
**50 min.: 16-21**

**StÍF:** Fríðrún Danielsen 7, Bára Berthelsen 5, Rebekka Justinussen 5, Birna Johannesen 1, Mariann L. Petersen 1.
**Stjørnan:** Durita Ljósstein 8 (1), Durita Christophersen 6, Valentina Suciu 5, Judit Hansen 3, Una Olsen 3, Edith Hansen 1, Nicoletta R. Hansen 1.
Útvísingar: StÍF 5 – Stjørnan 3

**Tjaldur - VÍF** 36-23 (20-10)

Áskoðarar: 70 fólk
**10 min.: 8-2**
**20 min.: 14-6**
**40 min.: 28-13**
**50 min.: 33-17**

**Tjaldur:** Simona Petersen 10, Cornelia Rimbu 8, Adina Petrea 7 (1), Annika Thomsen 4, Barbara Nygaard 2, Sarah Ann Thomsen 2, Benadikta Johannesen 1, Jóhanna í Króki 1, Eyð Jacobsen 1.
**VÍF:** Liljan Djurhuus 11 (1), Tóra Seloy 5, Agnas Olsen 2, Rakul Joensen 2, Elisa Leo 1, Torgunn Johansen 1, Marita á Rógvu 1.
Útvísingar: Tjaldur 2 – VÍF 5

**VB - Neistin** 26-26 (13-12)

Dómarar: Karstin Joensen og Kristian Joensen
**10 min.: 5-4**
**20 min.: 7-9**
**40 min.: 18-17**
**50 min.: 22-22**

**VB:** Gintare Lydekaite 10 (5), Rannvá Johannessen 4, Bára Mortensen 4, Justina Balzarvicute 3, Gurið Mortensen 2, Svava Vestergaard 2, Una Egilsdóttir 1.
**Neistin:** Barbara Brauer 11 (3), Birita Wardum 4, Marjun Danberg 3, Bára Hansen (1), Jacklin Djurhuus 3, Katrin á Neystabø 2.
Útvísingar: VB 7 – Neistin 6